# fólki hevði sín týdning í tilgongdini



*ð eystanfyri Kelduna er lagt út til mentanarligt virksemi av ymiskum slagi, og Runavíkar kommuna hevur eitt nú boðið økið út til bygging*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

kommunu og Elduvíkar kommunu seinni atkvøddu um samanlegging, var eingin atkvøðugreiðsla í Runavíkar kommunu.

- Vit, sum sótu í býráðnum, hildu tað ikki vera neyðugt at hava fólkaatkvøðu um hesar samanleggingingar. Fólkið hevði talað og hevði atkvøtt fyri samanlegging við Skála kommunu, og tá ið hinar kommunurnar vóru lutfalsliga smærri, hildu vit tað ikki vera neyðugt við fleiri fólkaatkvøðum í Runavíkar kommunu, sigur hann.

## Gongur rætta vegin

Rodmundur Nielsen heldur, at nógv positiv viðurskifti eru at síggja á Skála og Skálafirði og sum heild í samstarvinum í samløgdu kommununi.

- Nýggj sethús eru bygd og verða bygd á Skála og í Skálafirði, og fólkatalið í bygdunum veksur.

Hann vísir á, at tað fer at tátta í við byggiøkjum í gomlu kommununi nú, men Runavíkar kommuna er í holt við at útvega nýggj økir, soleiðis at byggingin kann halda fram.

- Runavíkar kommuna røkkur nú heilt úr Æðuvík og norður til Elduvíkar, og eg haldi, at Skáli og Skálafjørður, sum liggja so sentralt í hesum øki, hava nógvar og góðar vakstrarmøguleikar – á ymiskum økjum og á ymiskan hátt.

Rodmundur sigur seg fegnast um tað vinnulív, sum er á Skála við eitt nú Skála Skipasmiðju, El-Service og øðrum størri og smærri vinnufyritøkum og arbeiðstakarum, men hann dylur ikki fyri, at hann kundi hugsað sær, at uppaftur meira "sving" var í á vinnuliga økinum, sum hann tekur til.

- Vit noyðast at ásanna, at skipasmiðjan er ikki tað, hon í sínari tíð var, og hetta kemst í fyrsta lagi av, at eingin nýbygging er. Hinvegin hevur skipasmiðjan hóast svingningar ein velduga stóran týdning fyri økið.

Hann vísir á, at El-Service telist millum tey fáu føroysku framleiðsluvirkini, sum bjóða seg fram uttanlands, og eingin ivi er um, hvønn týdning hetta hevur fyri virksemið hjá felagnum og teimum, sum starvast har.

## Gigantisk stig

Rodmundur heldur, at Skála og Skálafjørður eru rættiliga væl fyri á mentarliga økinum við bæði livandi ítróttarligum og andaligum virksemi.

Í aðrari grein í Fjarðastevnu-innlegginum nevnir hann fyrimyndarliga samstarvið, sum í nógv ár hevur verið millum bygdirnar, Skála og Strendur, á ítróttarliga økinum.

Borgarstjórin heldur tað vera heilt fantastiskt, soleiðis sum fólkið í økinum hevur staðið saman ítróttini og andliga virkseminum at gagni.

- Tey stig, sum tikin eru á andaliga økinum, eru gigantisk, sum hann tekur til. Í Skálafirði hava tey bygt Kelduna, sum er ein velduga stór verkætlan, og á Skála er nýligt bygt nýtt missiónhús. Haraftrat hevur brøðrasamkoman húsið, Nerija á Skála. So, her er nógv virksemi á andaliga og ítróttarliga økinum, sigur Rodmundur Nielsen.

## Sentralur Skálafjørður

Borgarstjórin heldur, at stórir møguleikar liggja í nýggja økinum, sum Runavíkar kommuna hevur lagt út í Skálafirði, eystanfyri Kelduna.

- Eg haldi, at Skálafjørður liggur ógvuliga sentralur í nýggju kommununi, og vit hava eitt nú bjóðað okkum fram at hýsa eini innandurafótbóltshøll á hesum øki. Jú, eg ivist onga løtu í, at her eru velduga stórir møguleikar, um kommunurnar í Eysturoy standa saman um hesa sentralu plasering og tey tøk, sum her kunnu takast í felag.

Runavíkar kommuna hevur nevniliga lagt hendan partin av økinum eystanfyri Kelduna út til mentanarligt virksemi av ymiskum slagi, og Rodmundur Nielsen dylur ikki fyri, at hann setir stórar vónir til, at her fer okkurt gott at spyrjast burtur úr.



*Nýtt missiónshús er bygt á Skála. Húsið er ikki liðugt enn, men niðasta hæddin er tikin í nýtslu*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*- Fólkið á vestara armi á Skálafjørðinum hevur staðið væl saman, og gigantisk stig eru tikin*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*